KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 14.09.2015 kl. 19:00
Nevndarlimir::

Onnur:
Protokollførari:

Málsyvirlit		
Til afgørelse		
79/15	15/00866-4	Býráðslimur burturstaddur - Gunvá við Keldu
80/15	15/00872-5	Farloyvi frá býráðsarbeiðinum í meira enn tveir mánaðar - Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, býráðslimur
81/15	15/00868-1	Loyvi at røkja løgtingsarbeiðið og borgarstjóraarbeiðið samstundis - Jógvan Skorheim

Til afgørelse

79/15
15/00866 Býráðslimur burturstaddur - Gunvá við Keldu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	14.09.2015	79/15	

Frágreiðing um málið:
Gunvá við Keldu, býráðslimur, hevur umvegis teldupost og telefon boðað borgarstjóranum frá, at hon verður burturstødd í meira enn samfullar 14 dagar og tí ikki fær møtt á býráðsfundinum hóskvøldið 17. sept. Hon biður samstundis um, at næstvaldi á listanum fær fundarboð til hendan býráðsfundin.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, §18:
Stk. 2 Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
Stk. 3 Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Tilmæli:
Mælt verður til, at Erling Petersen, ið er næstvaldi á valevnislistanum, tekur sæti í býráðnum á fundinum 17. sept. 2015 fyri Gunvá við Keldu.

Býráðsins samtykt 14-09-2015
Tilmælið samtykt, og Erling Petersen tók sæti fyri Gunvá við Keldu.

80/15
15/00872 Farloyvi frá býráðsarbeiðinum í meira enn tveir mánaðar - Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, býráðslimur

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	14.09.2015	80/15	

Frágreiðing um málið:
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, býráðslimur, hevur umvegis teldupost og telefon boðað borgarstjóranum frá, at hon fer í farloyvi frá býráðsarbeiðinum frá í dag, 14. sept. 2015 og minst tveir mánaðar fram at rokna. Hon biður samstundis um, at næstvaldi á listanum fær fundarboð til hendan býráðsfundin.

Lógargrundarlag:

- Kommunustýrislógin, §18:

  Stk. 2 Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
  Stk. 3 Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

- Reglugerð fyri innkalling av varalimum í býráðið og føstu nevndir býráðsins, sum samtykt av býráðnum 22. mars 2011, § 6 (um langtíðar farloyvi):

  Um býráðslimur fær forfall ella søkir um farloyvi í eitt tíðarskeið, sum er longri enn 2 mánaðar, tekur næsti persónur á viðkomandi vallista sæti bæði í býráðnum og sum limur/varalimur í teimum nevndum, har býráðslimurin, sum fer í farloyvi, er limur/varalimur.

Tilmæli:
Av tí at Erling Petersen, ið er næstvaldur á valevnislistanum, longu hevur fingið fundarboð fyri Gunvá við Keldu til eykabýráðsfundin í kvøld, og Óli M. Lassen, ið er næstvaldur eftir Erling á valevnislistanum hevur boðað frá, at hann ikki tekur sæti, verður mælt til, at Jan Gardar, ið er annar næstvaldi á valevnislistanum, tekur sæti í býráðnum á eyka býráðsfundinum 15. sept. 2015 fyri Elsebeth M. Gunnleygsdóttur.

Býráðsins samtykt 14-09-2015
Tilmælið samtykt, og Jan Gardar tók sæti fyri Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

81/15
15/00868 Loyvi at røkja løgtingsarbeiðið og borgarstjóraarbeiðið samstundis - Jógvan Skorheim

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	14.09.2015	81/15	

Frágreiðing um málið:
Borgarstjórin, Jógvan Skorheim, hevur í skrivi dagf. 11. sept. 2015 søkt Klaksvíkar Býráð um heimild til at taka sæti í Løgtinginum, tað ið eftir er av hesi býráðssetuni.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009

- § 8. Tá ið góðkent er, at løgtingsmaður er valdur, skal hann leggja frá sær øll álitisstørv í nevndum, ráðum o.t., sum eru undir eftirliti landsstýrisins ella, sum landsstýrið hevur skipað hann í, tó undantikin beinleiðis fólkavald umboð.

Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003

- § 6. Stk. 2. Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Setanarbrøkur borgarstjórans verður ásettur í kommunustýrisskipanini til antin ½ ella 1/1. Um setanarbrøkurin er 1/1, skal borgarstjórin, tá ið hann er valdur, leggja borgarliga starvið frá sær umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við starvið sum borgarstjóri. Kommunustýrið kann loyva frávik frá regluni í 4. pkt, tá ið umræður størv sum eru beinleiðis fólkavald.

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Býráðið skal taka støðu til umsókn frá borgarstjóranum um heimild til at taka sæti í Løgtinginum. Vísandi til skriv frá borgarstjóranum dagf. 11. sept. 2015.

Býráðsins samtykt 14-09-2015
Einmælt samtykt, at Jógvan Skorheim er ógegnigur og tí ikki kann taka lut í viðgerðini av hesum máli. Jógvan Skorheim fór tí av fundinum.

Kristian Eli Zachariasen heitti á býráðið um at lata Beintu Klakstein, ið er næstvald á valevnislistanum, sleppa at taka sæti í býráðnum fyri Jógvan Skorheim. Áheitanin varð einmælt gingin á møti, og Beinta Klakstein tók sæti fyri Jógvan Skorheim.

Steinbjørn O. Jacobsen, 1. varaborgarstjóri, tók sæti sum fundarleiðari í borgarstjórans stað.

Atkvøtt varð um hetta uppskot:

"*Klaksvíkar Býráð loyvir Jógvani Skorheim, borgarstjóra, at taka upp løgtingsarbeiðið samsvarandi umsókn hansara, dagf. 11. sept. 2015, samstundis sum hann er borgarstjóri.*"
Fyri uppskotinum atkvøddu 3 býráðslimir – Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen og Beinta Klakstein.
Ímóti uppskotinum atkvøddu 8 býráðslimir – Steinbjørn O. Jacobsen, Jóhann Lützen, Óluva Klettskarð, Erling Petersen, Eyðstein Ó. Poulsen, Jan Gardar, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.
Sostatt var uppskotið felt.